## TIT SPYRJA VIT SVARA



*Bergur Hanusson, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*

LESTRARVEGLEIÐARIN

### Hvat er betri, HF ella HH?

Um man hugsar um at læra til okkurt innan hesi økir: Dekoratør, pallsmíð, grafiskt design, zoneterapi, fysioterapi og pedagog, hvat er so betri at taka áðrenn, HF ella HH?

*Bæði HF og HH eru sokallaðar miðnámsútbúgvingar, eins og Studentsútbúgvingin, HT á Tekniska Skúla og HIF á Fiskivinnuskúlanum. Tá upptøkutreytin til víðari lestur er ein miðnámsútbúgving, viga allar miðnámsútbúgvingarnar tað sama. Um upptøkutreytirnar harumframt eru ávísar lærugreinir á ávísum stigi, veldst um, á hvørjari miðnámsútbúgving tú fært hesar lærugreinir á rætta stigi.*

*Tú nevnir nógvar og ymiskar útbúgvingar, sum tú kanska kundi hugsað tær at tikið. Felags fyri tær allar er, at í upptøkutreytunum er einki krav um nakra ávísa lærugrein á nøkrum ávísum stigi. Til dekoratør og teater- og udstillingsteknisk assistent (innan pallsmíð) krevst bert 9. flokkur, meðan ein upptøkuroynd avger, um ein sleppur inn til scenograf og grafiskan designara. Fyri at læra til zoneterapeut eru eingi ávís skúlakrøv, meðan ein miðnámsútbúgving ella annað er treyt fyri at sleppa at læra til pedagog og fysioterapeut.*

*Bæði HF og HH geva tær tí teir somu upptøkumøguleikar til tær útbúgvingar, sum tú nevnir. Hóast hetta er tað skilagott at kanna, hvørjum skúla og hvørjum lærugreinum tú fært mest gagn burturúr til tær útbúgvingar, sum tú best kundi hugsað tær. Hetta fært tú mest at vita um við at venda tær til teir ávísu útbúgvingarstovnarnar.*

FERÐSLUTRYGD

### Kavarudding vegarbeiði

Nú veturin av røttum kann sigast, at verða komin, eru kavaruddingarmaskinurnar hjá Landsverkfrøðinginum aftur vanligar at síggja á vegnum. Mín spurningur er: Hava hesar maskinur loyvi at koyra á vegnum? Eg hugsi serstakliga um ljósini á hesum akførum. Tey eru ikki ætlað mótkoyrandi ferðslu og eru blendandi fyri hesi. Tað er eisini alt meiri vanligt, at lastbilar hava langljósini uppi á takinum. Er hetta loyvt?

*Tykir mær eitt sindur løgið at spyrja um kavaruddingarmaskinur hava loyvi at koyra á vegnum. Hvussu skuldu tær annars kunnað rudda kavan burtur? Annars er spurningurin sendur víðari til Landsverkfrøðingsstovninum, sum upplýsir, at kavarudding er at meta sum vegarbeiði og maskinurnar, ið verða nýttar til hetta arbeiði, eru arbeiðsamboð, ið eru umtalaði á ferðslulógini ß 2 C, sum er soljóðandi: Motordrivið akfar, sum í høvuðsheitum er ˙útgjørt sum arbeiðsamboð, og gjørt at ganga í mesta lagi 30 km um tíman og bert við størri broyting í tilgerðini kann fáast at ganga skjótari, eisini motordrivið akfar, sum ætlað er at skula stýrast av persóni til gongu, er at skilja sum motoramboð. Landsverkfrøðingurin upplýsir eisini, at allar maskinurnar hava gult roterandi ljós og projektørar, ið lýsa frameftir, so maskinførarin hevur møguleika at síggja í kavaroki. Viðmerkt verður eisini, at projektørarnir lýsa niður á vegin.*

LÆKNIN

### Hvussu er eitt lúsalív

Eg eri mamma at 9 ára gamlari gentu, sum síðan skúlin byrjaði aftur aftaná summarfrítíðina ferð eftir ferð er komin heim við lýs. Tað hevur higartil kostað nógv í lúsasjampoo, tí øll familjan má jú viðgerast hvørja ferð ein innrás hevur verið, fyri ikki at tala um alt klædnavaskið av seingjaklæðum, handklæðum, húgvum o.ø.

Tað sum eg kundi hugsað mær at vita er: Hvussu er eitt lúsalív? Hvussu leingi livir ein lús? Hvussu long tíð gongur frá egg til lús? Hvussu leingi kann ein lús liva uttan vert? Hvar eru lýsnar, tá tær ikki gera innrás í hárinum á dóttir míni? Passar tað, at ein lús ikki kann yvirliva í hári sum er litað. Mær vitandi er tað ikki hárinum, lýs liva av, men blóðnum. Ella hvussu?



*Nøkur fakta um lýs: Tað finnast 2800 sløg av lúsum. 2600 av hesum hoyra til hópin Mallophaga (fjaðra- og pelslýs), og hinar 200 eru sokallaðar ektaðar lýs úr hópinum Anoplura. Tað eru millum hesar seinnu, vit finna lýsnar, sum kunnu plága menniskjuni.*

*Ymsu lýsnar eru so krænsar ella vertsspecifikkar, at eitt ávíst lúsaslag bert trívist á einum ávísum vertsslagi. Soleiðis verða menniskjuni sum vertur bert plágað av trimum lúsasløgum: Pediculus humanus capitis (høvuðlúsin), Pediculus humanus corporis (kroppslúsin) og Phthirus pubis (flatlúsin).*
*Tað er høvuðlúsin, sum í heyst og vetur og eisini áður hevur plágað børn og barnafamiljur.*
*Hon er 2 mm long, kann hvørki flúgva ella hoppa. Tolir illa temperaturbroytingar. Honlúsin leggur eggini og klistrar tey fast á hárið, tætt við húðina rundanum oyrað og á nakkanum. Eggini klekjast eftir 8 døgum til eina ormveru (nymfu), sum eftir 8 døgum verður ein vaksin lús, sum kann liva ein mánaða. Men hendan mánaðan eru tær sera fruktbarar og leggja fleiri egg.*

*Alt lívið (allan mánaðan!) livir hon á ella millum hárini á høvdinum. Dettur lúsin av vertinum, doyr hon skjótt - innan 48 tímar.*

*Úr munnpartinum stinga lýsnar evarska smá rør inn í húðina á vertinum og súgva blóð haðani. Tær liva av blóði. Meðan tær súgva og eina løtu aftaná máltíðina eru tær reyðar á liti av blóðinum. Í súgvirørunum eru enzymir, sum forða blóðinum at storkna, og lúsin kann ótarnað súgva blóðið upp, uttan at rørið tippist.*

*Eg havi ongantíð hoyrt, at lús ikki trívist í litaðum hári. Skuldi tað verið so, má orsøkin vera okkurt kemisk evni úr litivætuni, sum lúsin ikki tolir; hon er jú so kræsin og eisini viðkvom.*

*Tað er ikki neyðugt at viðgera øll í húskinum, men bert tey raktu, og tey plaga at líða av øgiligum skriða. Tað ræður um at leita væl eftir lús og eggum í og millum hárini. Nix-shampoo verður mest brúkt, og ein eigur at halda seg neyvt til vegleiðingina, sum liggur við. Ivast tú, um tað er egg ella flus, tú sært, skalt tú draga hárið millum tveir fingrar. Tá vil flusið detta av, men ikki eggini. Sjálva lúsuni fert tú ikki skeivur av.*

*Tað er skilagott at vaska seingjarklæðini, klæðini, sum júst hava verið í nýtslu, toybamsur og líknandi og eisini kambar, bustir, hárspenni, hárbond o.t. At støvsúgva gólvteppini í húsinum verður eisini tilmælt av summum. Er okkurt klædnastykki undir illgruna, og hetta ikki ber so væl til at vaska, kanst tú ístaðin pakka tað væl inn í ein plastikkposa og goyma tað avsíðis einar 10 dagar. Eftir hetta skuldi eingin vandi verið fyri smittu.*

**Spyrjið serfrøðingarnar**

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo

# Mál letur hurðar upp

**Europaráðið og Europasamveldið hava í felag útnevnt árið í ár til Europeiskt Málár**

MÁL
*Turið Kjølbro*

Endamálið við at útnevna árið í ár til Málár er fyrst og fremst at geva málsliga og mentunarliga ríkidøminum í Europa gætur.

Í sambandi við Málárið kemur tíðindablaðið Málár 2001 út fýra ferðir í ár. Í blaðnum eru nógvar áhugaverdar greinir. Margrethe Vestager, kenslumálaráðharri í Danmark, skrivar í innleiðingini, at vit skulu ikki bert læra mál, tí vit búskaparliga fáa nakað burtur úr. Vit skulu eisini læra mál, tí vit mentunarliga gerast ríkari. Mál víðkar sjónarringin og gevur okkum nýggjar møguleikar, uttan mun til um tað snýr seg um okkara arbeiði ella frítíð. Í hesum sambandi mugu vit ikki gloyma, at tað Europa, sum verður bygt í dag, gevur okkum møguleika at búgva og arbeiða alla staðni tvørtur um landafrøðilig mørk. Eisini eiga vit at minnast til, at eitt týdningarmikið mál, um ikki tað týdningarmesta, er at byggja eitt Europa, har fólk skilja og virða hvønn annan. Øll uttan mun til aldur kunnu og eiga at ogna sær vitan um mál og mentan í øðrum londum, tí sum átakið fyri málárið ljóðar: Mál letur hurðar upp.

Í blaðnum Málár 2001 eru upplýsingar um málárið, greinir um mál og týdning tess fyri samleika, felagskap og betri fatan millum fólk tvørtur um landamørk. Vilt tú vita meiri um Málár 2001 kanst tú fara inn á hesa heimasíðina: www.eurolang2001.org



# Sólarkaffi í nýggjum bygdarhúsi

**Leirvíkingar heilsaðu mánakvøldið Sólini væl afturkomnari og drukku sólarkaffi í spildunýggjum, sera snotiligum bygdarhúsi**



*Gentukórið setti dám á hátíðarhaldið, tá bygdarhúsið varð tikið í nýtslu aftur*
*Mynd: Edvard Joensen*

BYGDARBALL
*Edvard Joensen*

**Leirvík:** Í spildurnýggjum umhvørvi, sum leirvíkingar hava alla grund at vera stoltir av, drukku tey sólarkaffi mánakvøldið.

Tað fór maður av húsi í Leirvík mánakvøldið. Tað serliga leirvíksfyribrigdið, sólarkaffi, skuldi haldast. Men tað var nú kanska líka nógv tað, at bygdarhúsið skuldi takast í brúk av nýggjum, sum savnaði serliga nógv fólk. Og tey mongu, sum komu í húsið hetta kvøldið, vórðu øll samd um, at leirvíkingar hava fingið eitt sera gott og snotuligt hús.

Leirvíkskøkurnar hava altíð verið tiltiknar. Minnist, tá vit sum dreingir plagdu at spæla fótbólt móti leirvíkingum. Tá var eingin vøllur í Leirvík, so spælt varð í Gøtu. Tá komu tær í ítróttarhúsið í Norðragøtu at geva okkum at eta, leirvíkskonurnar, við øllum køkunum. Og tað vóru nógvar rosinur í.

Og tað var vist, at tað fyrsta, lagt varð merki til í bygdarhúsinum mánakvøldið, vóru allar køkurnar.

Men nú vóru tær við róma. Blomstrutar, fagurt littar við jarðberum, kiwi, fersken og Guð viti hvørjum. Quark køkur, grøna køkur, og.... Tað hevði hug at seta seg á rivjabeinini, bara at síggja tær.

Og mitt í rúgvuni av konum, sum gingu og stákaðust, gekk Kristianna Joensen og sá ógvuliga væl nøgd út.

Tað var nú ikki bara av øllum køkunum, segði hon. Men meira tí, at hetta flotta húsið var liðugt.

Kristianna Joensen er formaður i nevndini fyri bygdarhúsið. Og hon hevur verið primus motor alla tíðina, skilst.

### Vælvild frá bygdarfólkinum

Kristianna sigur frá, at tey hava kent eina øgiliga vælvild frá øllum bygdarfólkinum, alla tíðina, húsið hevur verð til.

Ætlanin var av fyrstan tíð at gera eitt hús í tveimum hæddum, greiðir Kristianna frá. Men tá niðara hæddin stóð liðug í 1986, vóru tey greið yvir, at tey kláraðu ikki meira fíggjarliga tá beinanveg. Tí varð avgjørt at innrætta ta hæddina og brúka hana, til umstøður vórðu at byggja út.

Húsið varð so brúkt í 15 ár, og tað hevur verið nógv brúkt, sigur Kristianna. Og tað hevur riggað væl.

Útbyggingin er so gjørd í heyst og í vetur, og nú stendur hetta snotuliga húsið liðugt, fegnast Kristianna um.

Hendan útbyggingin, sum nú er gjørd, varð ætlað at kosta 2,7 milliónir, sigur hon. Men tað gjørdist eitt sindur dýrari, og fór upp um tríggjar milliónir.

Kristianna sigur, at tey hava fingið 450.000,- krónur í gávum frá fyritøkum og privatfólki í Leirvík. Einar 800.000,- krónur átti húsið, áðrenn farið varð at byggja.

Lán varð tikið, tá fyrra byggistigið varð tikið í brúk, men tað var niðurgoldið, áðrenn farið varð undir hesa útbyggingina. Nú er so nýtt lán upp á 1,2 milliónir krónur tikið. Og tað ætla tey at gjalda aftur yvir 10 ár, sigur Kristianna. Restina fara tey at royna at fíggja aðrar vegir.

### Stór broyting

Hóast útveggirnir at kalla eru teir somu, er húsið ikki til at kenna aftur. Ein lítil útbygningur er komin oman úr køkinum, annars eru veggirnir teir somu.

Útbyggingin er farin uppeftir og hevur givið húsinum rúm. Fyrr var í grundini talan um ein kjallara, har viðhvørt kundi tykjast rongt.

Nú hevur húsið tvær stórar hallir. Onnur fimm metrar høg og hin tríggjar metrar. Umframt hevur høgra høllin, tann stóri salurin, hálvt loft við líkasum einum svala, har eisini væl av fólki fær sitið.

Mánakvøldið var borðreitt fyri 308 fólkum segði Kristianna. Og tey sótu heilt rúmliga. Bara í stóra salinum skuldu 300 fólk sitið væl til vanligar veitslur, sigur hon.

Og húsið verður heilt nógv brúkt til veitslur av øllum slagi. Longu komandi leygarkvøld verður brúdleyp í húsinum, siga tey frá.

### Sólarkaffi

Sólarkaffi er helst eitt sermerkt leirvíksfyribrigdi. Í hvussu er her á landi, heldur Kristianna Joensen.

Í Leirvík hava tey havt sólarkaffi síðan onkuntíð umleið 1980, greiðir hon frá. Men í grundini er tað helst komið úr Íslandi, sigur hon.

Ein leirvíkskona, sum býr á Norðurlandinum í Íslandi, greiddi frá, at har, hon býr, plagdu tey at hava eina slíka samkomu, tá tey sóu sólina aftur um várið.

Og tað hildu tey so, at tey áttu at gjørt í Leirvík eisini. Tí her er sólin burtur ein part av vetrinum.

Tann 11. februar, sæst hon aftur, sigur Kristianna, og so hevur verið vanligt hesi seinnu árini at hava sólarkaffi tann sunnudagin, sum liggur næstur 11. februar.

Í ár varð tað flutt eitt sindur, tí tey vildu fegin leggja tað saman við, at bygdarhúsið varð tikið í nýtslu aftur. Ætlanin var, at tað skuldi verða sunnudagin, men tað varð so aftur flutt vegna veður.

Men ikki bilti. Leirvíkingar, bæði nær og fjar, møttu manssterkir upp at fáa sær kaffi í nýggja húsinum.

Ella kanska vóru tað tær frálíku køkurnar, sum drógu? Í hvussu er, sigur Kristianna, høvdu tær, sum skipaðu fyri, heitt á tær, sum gjørt hava køkurnar, um at gera tvær í part hesaferð. Og tað var ivaleyst skilagott. Men ein av gestunum – hann býr í Fuglafirði – var tó eitt sindur ivasamur, um hetta nú vóru rættiligar leirvíkskøkur. Tí sum hann tók til:

»Eg havi roynt fleiri, men ikki funnið eina einastu rosinu.«

Men føtini tømdust skjótt.



*Køkuborðið freistaði mangan til meira, enn gott var*
*Mynd Edvard Joensen*